## Lánið frá russum ongan skund



Seinasta heyst søkti táverandi íslendska stjórnin russisku stjórnina um lán til at halda búskapinum uppi. Russar játtaðu, og síðani hava partarnir tingast um treytir og annað. Men í gjár segði russiski varafiggjarmálaráðharin, Dmitry Pankin, við Reuters, at Ísland hevur ikki tørv á láninum júst nú, men at tað verður avgreitt næsta ár. Reuters veit eisini at siga, at ein íslendsk sendinevnd hevur verið í Moskva og tingast við russar, men at partarnir kundu ikki semjast. Íslendska stjórnin søkti í fjør Russland um 5,6 milliardir dollarar í láni, men tann endaliga tilsøgnin frá russum var, at teir kundu læna íslendingum 500 milliónir dollarar, skrivar Vísir.

## Skipasmiðir fáa hjálp

Fyrradagin vórðu 175 starvsfólk hjá teirri kendu donsku Lindø-skipasmiðjuni hjá stórfyritøkuni A.P.Møller Mærsk koyrdir til hús, tí skipasmiðjan hevur so lítið at gera. Talan er yvirhøvur um verkfrøðingar og fólk í umsitingini, men tey skulu ætlandi ikki sita hendur í favn leingi. Formaðurin í Region Syddanmark, Carl Holst, sigur við Ritzau, at myndugleikarnir fara at leggja seg eftir at geva teimum uppsøgdu tilboð um endurútbúgving. Ætlanin hjá formanninum er at seta ein serligan arbeiðsbólk, sum skal kanna, hvat tey, sum higartil hava arbeitt við skipasmíði, kunnu gera, nú eingi skip eru at smíða.



## Barnapornoringur ikki í Føroyum

**Í gjáramorgunin gjørdi løgreglan í Norðurlondum húsarannsókn í 81 húsum í Norðurlondum samstundis. Ongin av hesum adressum var í Føroyum**

BARNAPORNO
*Eirikur í Jákupsstovu*
*eij@sosialurin.fo*

- Vit hava onki havt við hatta átakið at gera, so tað merkir, at ongin var í Føroyum. Tað mugu vera gleðilig tíðindi, sigur Bergleif Brimvík, kriminalovasti.

Hinvegin var talan um eitt heilt stórt átak í gjár, tá løgreglan vitjaði 81 ymiskar adressur í Norðurlondum, har illgruni var um, at fólk búgva inn, sum hava við barnaporno at gera.

Átakið varð hildið øgiliga loyniligt, til tað var liðugt, so at tað ikki hevði við sær, at fólk sjálvi fóru eftir fólki, sum eru undir illgruna fyri at gera og eiga barnaporno.

Somuleiðis var átakið hildið loyniligt, so tey við barnaporno ikki megnaðu at sletta ella goyma nøkur spor.

Danskir miðlar staðfesta, at tað vóru fólk í øllum samfelagnum og øllum støðum, ið eru undir illgruna fyri barnaporno.

Hóast nógv var gjørt burturúr, so var altso ongin uppíblandaður í Føroyum.

# Koyra 90 inn í Sandavág

**John S. Myllhamar, sum býr beint við ferðsluforðingina í Sandavági metir, at forðingin onga nyttu ger, tí bilar koyra umleið 90 kilometrar um tíman har. – Hon ger ikki sama mun, sum hon gjørdi, men tað er ikki meiningin, at mann skal doyggja, so skjótt mann fer upp um loyvda ferð, sigur Oyvindur Brimnes, stjóri á Landsverki**

FERÐSLUFORÐING
*Eirikur í Jákupsstovu*
*eij@sosialurin.fo*




*Hóast ferðsluforðingin hevur verið við í eini vanlukku og hevur kostað 500.000 krónur, so metir Oyvindur Brimnes, stjóri á landsverki, ikki, at tey hava dummað seg*

*Mynd: Edvard í Skorini Joensen*

Ferðsluforðingin í Sandavági, har ein maður endaði í eini vanlukku, er broytt. Nú vísir John S. Myllhamar, sum býr beint við forðingina, skrivar í dag, at bilarnir kunnu koyra umleið 90 kilometrar um tíman uttan trupulleikar.

- Vit fingu eina óefta kanning gjørda, og nú hava vit fylgt tilmælinum. Men tað er rætt, at hon ikki ger sama mun, sum hon gjørdi, men tað ber heldur ikki til at gera forðingar soleiðis, at tú doyrt, um tú koyrir skjótari enn lógin loyvir tí. Tú kanst eisini koyra 120 upp um eina bungu, sigur Oyvindur Brimnes.

Hann greiðir í sama viðfangi frá, at meiningin við eini forðing, er at geva fólki eina kenslu, so tey vita, hvussu skjótt tað er ráðiligt at koyra.

### Ongin nøs

Í gjár vóru uppsagnir hjá Landsverki, men Oyvindur Brimnes staðfestir, at ongin av hesum hevði nakað við ferðsluforðingina at gera.

- Uppsagnirnar vóru í heilt øðrum støðum, og tað er heldur ongin, sum hevur fingið nakra átalu ella ávaring fyri ferðsluforðingina, sigur Oyvindur Brimnes.

Hesum grundgevur hann við, at onki veruliga skeivt var gjørt.

- Ferðsluforðingin var gjørt eftir forskriftunum, men tað gekk ikki heilt, sum tað skuldi. Tað er heldur ikki óvanligt, at broyta onkur ting, eftir at mann hevur gjørt okkurt, hóast arbeiðið er gjørt eftir forskriftunum, greiðir Oyvindur Brimnes frá.

### Suksé er relativ

Oyvindur Brimnes vil heldur ikki siga, at Landsverk hevur dummað seg við ferðsluforðingini, hóast hon hevur verið við í eini vanlukku og hevur kostað einar 500.000 krónur.

- Eg veit ikki, um mann kann siga, at vit eru komin illa burtur úr hesi forðingini. Tað var gjørt eftir forskriftunum, so eg haldi tað er ein relativur spurningur, sigur Oyvindur Brimnes.

# Nú er altíð vatn í Sørvági

**Í gjár var arbeiðið við at leiða vatn úr Vatninum millum Sørvág og Miðvág til Sørvágs endaliga liðugt**

SØRVÁGUR
*Eirikur í Jákupsstovu*
*eij@sosialurin.fo*



*Nú verður vatn í Sørvági alt árið*

Síðan 1980 hevur verið arbeitt við at fáa vatnveitingina í Sørvági fullkomna, so borgararnir í bygdini sleppa undan at spara vatn í maimánaði, tá vatnverkið í Húsadali onkuntíð ikki megnar at lata nóg mikið av vatni til borgararnar í Sørvági.

- Tað plagar at vera í maimánaði, at turkur er, og tá kom ofta fyri, at vit máttu spara vatn, greiðir Sune Jacobsen, borgarstjóri í Sørvágs kommunu frá.

Nú er hetta søga, tí í gjár var arbeiðið við at leiða vatn úr Vatninum, sum tey har vesturi vanliga rópa Sørvágs/Leitisvatn.

Borgarstjórin fegnast, at tey nú eru trygg við vatni, og vónar at Vatnið verður verandi í tílíkum standi, at tað kann nýtast sum drekkivatn.